Hóast bakkast í oljuleiting:

# Elttør bjartskygdur og lovar nýggja útbjóðing skjótt

OLJULETING
*Jan Müller*

- Hetta er sjálvandi eitt bakkast og spell fyri okkum øll, men enn resta fýra brunnar, so okkum nýtast ikki at fella í fátt. Hetta sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum, nú tað er staðfest, at 4. brunnurin á landgrunnurin er turrur.

Landsstýrismaðurin ásannar, at tað gekst ikki sum vónað og ætlað við hesum brunninum heldur, men samtíðis leggur hann dent á, at allar súðir eru ikki syftar, tí helvtin av brunnunum resta í at verða boraðir. Sjálvur er hann framvegis bjartskygdur og heldur, at fyrr ella seinni verður troffið við lønandi oljufund á landgrunninum. Hann ivast onga løtu í, at oljan finst í okkara undirgrund. Spurningurin er bara um at vísa tol. Samtíðis vísir hann eisini á, at hinir brunnarnir hava ikki allir verið negativir. Teir hava staðfest kolvetni og eina virkna oljuskipan, og brunnurin hjá Hess kann entá gerast ein lønandi oljukelda, tá avtornar.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður setur álitið á teir fýra brunnarnar, sum eftir eru at bora og á 9 ára loyvini*

Eyðun Elttør sær tað tí heldur ikki sum nakra misálitsváttan á seg og sítt arbeiði og sigur einum brosi, at hann ætlar sær ikki at leggja frá sær, nú einki lønandi fund er gjørt, tá helvtin av brunnunum eru boraðir.

- Tað síggi eg onga orsøk til. Fýra brunnar eru eftir at bora, og tann ætlanin verður so framd komandi árini. – Tað eru annars upp og niðurgangstíðir í fiskivinnuni, men har verður so ikki tosað um, at ráðharrar skulu leggja frá sær.

*- Er tað ikki eitt stórt vónbrot, at hesin 4. brunnurin ikki gav veruligt úrslit?*

- Tað er altíð eitt vónbrot, at ein brunnur er turrur. Men eg haldi ikki vit vera skulu vera so vónbrotin, at vit ikki megna at hyggja frameftir. Eg ivist ikki í, at oljufeløgini fara at hyggja væl eftir úrslitunum av teimum fyrstu fýra brunnunum og brúka tey til at endurskoða sínar komandi ætlanir.

*- Sær tú møguleika fyri at flyta onkran brunn úr 1. umfari til 9 ára loyvi ella annað loyvisumfar?*

- Sum støðan er nú so skulu teir fýra brunnarnir borast, har loyvini eru latin. Eg haldi meg til tær avtalur, sum eru gjørdar og sum galda í løtuni.

Eyðun Elttør sigur, at tey samráðast í løtuni við oljufeløgini um 9 ára loyvini. Tað sær rættiliga spennandi út.

### Nýggj útbjóðing

Eyðun Elttør váttar, at tey í Oljumálaráðnum arbeiða miðvíst við eini nýggjari útbjóðing. Tað verður innanhýsis viðgjørt av jarðfrøðingunum. Og í heyst fara tey at tosa við oljufeløgini. So um nýggjarsleiti vita vit betri. Kanska ein kann bjóða út til várs, soleiðis at fyrstu loyvini verða latin næsta heyst. Men tá skal eisini alt fella uppá pláss og ganga væl sigur landsstýrismaðurin.

Hann vónar annars, at oljufeløgini fara at hava áhuga fyri einum nýggjum umfari, og at okkurt nýtt felag kemur inn á økið aftrat.

Ein nýggj runda fer at verða norðan og vestan fyri verandi leitingarøki.

*- Er tað ikki í so bjartskygt, tá hugsað verður um úrslitið higartil?*

- Tað haldi eg ikki. Samanbera vit við onnur leitiøki, so tekur tað eisini tíð at raka við olju, og nú olja er staðfest her, nýtist tað ikki at ganga alt ov rúm tíð, til eitt lønandi felt verður funnið.

*- Nógv verður tosað um sparing. Er tað ikki pláss fyri sparingum í Oljumálaráðnum, nú eingin olja verður funnin, og útlitini eru ivasom?*

- Vit skulu sjálvandi eisini spara sum onnur ráð. Men vit hava framvegis nógv arbeiði at gera. Fýra brunnar aftrat sum sagt, 9 ára loyvini bíða og ein nýggj runda skal eisini leggjast til rættis.

Eyðun Elttør heldur annars ikki Oljumálaráðið verða nakað stórt ráð í oljuhøpi. Verður olja funnin, so verður tað tvørturímóti neyðugt at økja um fyrisitingina. Og tað kann henda innan rímuliga tíð.

---

Brunnurin turrur:

# ENI boringin eitt vónbrot

**Landsstýrismaðurin í oljumálum leggur upp til, at oljujfeløgini fara at bora djúpri í komandi boringum**

Tíðindaskriv

Leitibrunnur 6004/17-1, ið boriskipið Belford Dolphin borar fyri ENI samtakið og Føroya Kolvetni á loyvisøki 002, er liðugt boraður.

Borað er gjøgnum ætlaðu leitimiðini og boringin steðgaði á 3847 metra dýpd. Afturvendandi boritrupulleikar hava ávirkað og seinkað boringina nakað.

Tekin um olju ella gass hava ikki verið at sæð í brunninum, sum í løtuni verður læstur. Mátiúrslit og tilfar úr brunninum verða neyvt kannað komandi mánaðirnar.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum, sigur: »Úrslitið er eitt vónbrot, men ikki altavgerandi fyri oljuleiting á føroyska landgrunninum. Fleiri boringar skulu gerast komandi árini, og tá verða vónandi eisini leitimið, ið liggja djúpari, havd í huga. Oljuleiting á føroyskum øki heldur fram og í løtuni verða nýggjar arbeiðsskráir fyri 9-ára loyvini avtalaðar millum Oljumálaráðið og loyvishavararnar. Samstundis eru Oljumálaráðið og Jarðfrøðisavnið farin undir at fyrireika 2. Útbjóðingarumfar, og eg rokni við, at oljuleitingin einaferð fer at geva vónaðu úrslitini.«

---

Rúni Hansen, Statoil:

# Tveita ikki handklæðið í ringin

HELVTIN BORAÐ
*Jan Müller*

4. brunnurin á landgrunninum er turrur. Italska fyristøðufelagið ENI kom á botn nú um dagarnar og ger í løtuni seinastu jarðfrøðiligu kanningarnar í brunninum. Um nakrar dagar verður boriholið fylt uppaftur og proppur settur í, og boriskipið Belford Dolphin setur kós úr føroyskum sjógvi móti tí næstu uppgávuni úti í heimi. Við hesi boringini er komið í helvt taka vit allar teir átta brunnarnar, sum oljufeløgini bundu seg til at bora í 1. útbjóðingarumfari, ið varð sett út í kortið í 2000. Fyristøðufeløgini BP, Statoil, Amerada Hess og nú ENI (Agip) hava borað hvør sín brunn. Kolvetni eru funnin í minni og størri mongdum, og harvið er ein virkin kolvetnisskipan staðfest. Men eingin brunnur hevur givið okkum grønt ljós, soleiðis at vit kunnu kalla okkum oljutjóð. Gula ljósið lýsir tó framvegis í einum av brunnunum, tí hjá Amerada Hess, har týðandi mongdir av kolvetni vórðu funnar. Her eru so enn vónir til, at talan kann verða um eitt lønandi fund. Tað vil tíðin so vísa.



Eitt av teimum virknastu oljufeløgunum á landgrunninum er norska Statoil, sum í løtuni ger áhugaverdar og spennandi seismiskar kanningar í sínum 9 ára loyvi. Hvørjar vónir hevur so stjórin hjá Statoil, Rúni Hansen til framtíðina, nú 4. brunnurin á landgrunninum er turrur.

- Hetta er sjálvandi negativt fyri økið, men tó ikki so ringt, at vit tveita handklæðið í ringin. Framvegis eru fýra brunnar eftir at bora og hartil koma 9 ára loyvini, sum eftir øllum at døma síggja áhugaverd út. Sjálvur heldur hann ikki møguleikarnar fyri at gera fund í Gullhorninum verða úttømdar. Men hvør turrur brunnur er sjálvandi eitt bakkast fyri økið leggur hann aftrat.

Statoil er í løtuni í gongd við at viðgera seismikkin, ið varð skotin síðsta ár saman við Amerada Hess á loyvi 002 og 003, og tíðin fer at vísa, hvat spyrst burturúr hesum. Samstundis hevur man teir fýra brunnarnar, ið longu eru boraðir, at halda seg til, í arbeiðinum við at skilja økið betri. Hann dylur tó ikki fyri, at tey hjá Statoil síggjar stórar møguleikar í 9 ára loyvinum, har tey í løtuni skjóta nýggjan seismikk við tí vón at síggja betri niður gjøgnum basaltið, har tey halda seg hóma stórar strukturar, ið kunnu vera stórar oljukeldur.

Rúni Hansen hevur stórar vónir til seismisku kanningarnar tey gera í løtuni við eitt av skipunum hjá Veritas. Hetta eru framkomnar kanningar við eitt sindur broyttum arbeiðshátti, sum man kann siga eru skræddaraseymaðar til at kunna síggja betri gjøgnum basaltið. Og fara hesar kanningarnar at vísa seg at vera eitt gjøgnumbrot í royndunum at bróta basaltnøtina, so kann tað hava stóran týdning fyri 9 ára loyvið. Tey ymsu feløgini eru í løtuni í samráðingum við Oljumálaráðið um hesi 9 ára loyvi. Tey vórðu latin í 2000 við tí áseting, at feløgini í heyst skuldu siga frá, hvat tey ætlaðu víðari á hesum loyvum. Umframt 9 ára loyvið hjá Statoil, har Anadarko, Petro Canada, Shell og Dong eisini eru við, hevur Anadarko eitt slíkt loyvi og haraftrat hava ENI og Føroya Kolvetni eitt loyvi. Rúni Hansen frá Statoil roknar við, at endaliga viðgerðin av tí seismikki tey skjóta nú, verður liðug um eitt ár.



# Á hálvari leið

4 BRUNNAR EFTIR ANALYSA
*Jan Muller*

So hendi tað aftur. Tað fáur hevði vónað men sum mong høvdu roknað við. Enn ein turrur brunnur á landgrunninum. Hesaferð hjá italska fyristøðufelagnum ENI, og har Føroya Kolvetni er við. Eingin ivi – eitt bakkast fyri Føroyar sum komandi oljutjóð. Í eini tíð har ein risastór oljukelda fyri og onnur eftir á stóru dýpunum út fyri Vesturafrika opinberar sínar goymslur, og har oljuríkidømið undir irakiska sandinum bara bíðar eftir at floyma upp, sigur tað seg sjálvt, at eitt spildurnýtt og dýrt atkomiligt øki sum føroyski landgrunnurin hevur ikki ráð til alt ov nógvar turrar brunnar, áðrenn oljufeløgini missa áhugan og rýma og heldur velja at váða sínar pengar á meiri trygga grund.

Hetta er tó ikki so einfalt, sum tað kann síggja út til. Tí oljufeløgini hava nevniliga bundið seg til at bora tilsamans 8 brunnar. Og her er eftir øllum at døma eingin góða mamma. Føroysku myndugleikarnir tryggjaðu sær, tá teir góvu loyvini, at feløgini bundu seg til at bora ella at gjalda tað boringarnar kosta – tvs. eftir »drill or pay« konseptinum. Men hví gjalda fleiri hundrað milliónir beinleiðis í føroyska landskassan heldur enn at royna eydnuna, tí tað kundi verið tú rakti við næstu ella triðju ferð og harvið fekk bingo.

Støðan í løtuni er tann, at BP skal bora tveir brunnar aftrat, Statoil ein og Amerada Hess ein. Hetta skal verða gjørt innan august 2006. Hvussu sær so framtíðin út? Vit kunnu gera metingar út frá okkara egna veruleika og út frá, hvussu man hevur borið seg at aðrastaðni.

Givið er at feløgini, um tey vilja sleppa burtur úr sínum boriforpliktilsum við m.a. at vísa til, hvussu »lætt« tað er aðrastaðni, sleppa tað ikki uttan víðari. Tá víst verður til at borast skulu einir 5 brunnar fyri at gera eitt fund, er greitt, at vit eru ikki komin á mál, tí enn eru »bert« 4 brunnar boraðir. Fyrr var tummilfingraregulin lutfallið 9 til 1. Og tá vit so vita, at hetta er eitt spildurnýtt øki, krevur tað eisini størri arbeiði og váða í byrjanini. Vit mugu tí ganga út frá, at feløgini fara ikki at skunda sær. Heldur fara tey at brúka ta neyðugu fyrireikingartíðina og tað kann merkja, at tað helst ikki verður borað aftur á landgrunninum fyrr enn í 2005 ella møguliga í 2006. Also eingin oljuboring á landgrunninum næstu tvey árini. Hetta sendir so eisini nøkur týðandi og ikki serliga hugalig signal til føroysku veitararnar. Tað staðfestir so aftur týdningin av, at føroyskar fyritøkur bara hava havt oljuvinnuna sum eitt eyka bein. Hvørja avleiðing hetta kann fáa fyri oljuútgerðarhavnina í Runavík er so ein annar spurningur.




*Pílurin sunnanfyri vísir, hvar ENI hevur borað í Gullhorninum. Pílurin norðan fyri vísir mest áhugaverda partin av 9 ára loyvinum hjá Statoilsamtaki*

Lat okkum fyrst taka BP/Shell samtakið. Ein turran brunn og tveir eftir at bora. Fyrst vóru vónirnar sera góðar. Síðani bendir nógv á, at jarfrøðingarnir hjá feløgunum hava mist trúnna uppá at finna nakað í tí loyvinum, sum øll vildu hava fatur á, men sum BP fekk, tá tað beyð sær at bora heilar tríggjar brunnar. BP serfrøðingarnir hava verið sera kúrrir og hava helst bíðað eftir úrslitinum av ENI-brunninum, sum liggur ikki so langt vekk frá teirra loyvi. Hugsast kann eftir hetta, at BP fólkini eru enn meira ivasom. Men tey vita, at teir tveir brunnarnir skulu borast so ella so. Ein møguleiki er so at gera sum Amerada Hess og fara longur niður og vita, um tað er har olja goymir seg. Hetta merkir, at tú skal fara heilt burtur frá tí upprunaliga grundarlagnum, útgangsstøðinum, sum var Foinaven og Schiehallion modellið.

Ein annar møguleiki er at leggja »Gullhornið« á hillina eitt bil og heldur brúka orkuna uppá at leita onkra aðrastaðni í Gullhorninum ella uttan fyri tað, møguliga inni á basaltinum. BP hevur bundið seg at bora tveir brunnar aftrat í sínum loyvi. Kann tað hugsast, at tað sleppur við at bora bara annan teirra, um tað váðar nakað heilt nýtt, t.d. at bora á basaltinum? Hetta eru sum áður nevnt spekulatiónir. Vit mugu so eisini taka hædd fyri, at BP hevur einki 9 ára loyvi at fara til eins og t.d. Statoil hevur tað. Eftir tøgn í eina tíð verður tað sera áhugavert at hoyra, hvat »lokomotivið« á landgrunninum fer at fyritaka sær nú! Verður ferðin økt aftur við kós norðureftir? Ella longur niður? Tað er neyvan heldur hugsandi, at myndugleikarnir fara at »tvinga« BP at bora tveir brunnar í einum »turrum« øki, um endaligu niðurstøðurnar hjá BP eru ella verða, at tað er sannlíkt, at har er einki at fara eftir í sínum loyvi.

Statoilsamtakið hevur víst seg at vera meira opið og virkið eftir sín turra brunn. Í løtuni verða gjørdar framkomnar seismiskar kanningar á 9 ára loyvinum. Umboð fyri felagið hava víst á, at tey ikki hava slept vónunum enn, hóast tey negativu úrslitini á landgrunninum. At Statoil sum fyristøðufelag fyri tí stóra 9 ára loyvinum framvegis heldur tørn, og hevur nógv fólk, ið arbeiðir við føroyaøkinum, kundi bent á, at hesin norski oljurisin hevur sett sær fyri at vera verandi í Føroyum og taka á seg nýggjar váðar. Ella at politikkurin er, at so leingi tú ert á einum øki, verður full orka løgd í, inntil ein onnur avgerð verður tikin. Um úrslitið av seismisku kanningunum á 9 ára loyvinum er væleydnað, kann tað so hugsast, at Statoilsamtakið fer at biðja Oljumálaráðið um loyvi at flyta sín leitibrunn úr Gullhorninum og inn á 9 ára loyvið ístaðin? Spekulatiónir og tó! Ikki ein heilt ólogisk niðurstøða, um 9 ára loyvið sær meira lovandi út enn ein nýggj boring í 6 ára loyvinum í Gullhorninum. Kanksa er tað hesin eyka møguleikin, ið ger, at Statoil kann leggja seg meira afturá í teirra metingum um Føroyaøkið.

Síðani er tað Amerada Hess, sum fann Marjun kelduna. Vit hava hoyrt ómetaliga lítið eftir at avmarkingarbrunnur varð boraður bretsku megin markið. Hvat skulu vit so leggja í tað? Kann tøgnin hava nakað at gera við nýggju heimsstrategiina hjá felagnum, har man so spakuliga sleppur sær úr ella minkar um virksemi í Norðureuropa? At man vil niðurtrappa í Føroyum t.d. ella kanska heilt pakka saman? Tað kann sjálvandi eisini bara vera partur av spælinum, at tú heldur lágan profil, meðan metingar og tulkingar verða gjørdar. Ben Arabo, stjóri hevur sagt, at teir enn tulka og viðgera seinastu seismisku kanningarnar. Fyrr enn tær fyriliggja vil man einki siga um, nær og hvar verður farið til verka aftur.

Øll bíða spent eftir at vita, hvør lagnan verður hjá Marjunkelduni. Hess samtakið skal bora ein kanningarbrunn aftrat, og tað kann hugsast, at man vil brúka henda brunnin sum avmarkingarbrunn til Marjunkelduna eisini. Spurningurin er so, um Oljumálaráðið fer at góðtaka tað, tí hetta skal vera ein kanningarbrunnur. Men »kært barn har mange navne«, so tað verður sjálvandi ilt at gera av, um seinni brunnurin hjá Hess verður ein kanningarbrunnur burturav ella hann verður ein kombinatión av einum leiti- og einum avmarkingarbrunni. Time will show. Tíðin fer at vísa tað.

Tað besta fyri økið hevði sjálvandi verið, at Hess átók sær ein heilt nýggjan avmarkingarbrunn í føroyskum øki til at loysa Marjungátuna umframt at skula bora ein kanningarbrunn aftrat í loyvinum.

ENI átti so 4. brunnin. Eftir stendur felagið við einum 9 ára loyvi, har tað skal taka støðu til framhaldandi kanningar og helst boring eisini ella tað skal siga takk fyri hesaferð. Helst fer felagið at halda fram so ella so. Spurningurin er so, hvussu verður við skrivstovuni í Havn. Helst verður hon at halda fram men við lægsta blussi. At Føroya Kolvetni tók á seg ein so stóran váða sum at fara úr 7% upp í 25% í báðum loyvunum hjá ENI kann týða uppá, at vónirnar til 9 ára loyvið eru so mikið stórar, at tað verður hildið fast um tað.

Aftrat øllum hesum kemur so, at Anadarko eisini hevur eitt 9 ára loyvi burturav umframt at vera við í Statoil loyvinum. Felagið hevur víst stóran áhuga at halda fram við sínum arbeiði á landgrunninum og komandi tíð fer so eisini at vísa, hvørja avtalu tað fer at gera við myndugleikarnar.

Summa summarum má sigast, at Gullhornið er minni gullrandað enn tað hevur verið. Treyðugt so – økið er stórt og eru boraðu brunnarnir bert ein dropi í havinum. Vit kunnu rokna við minni fokus á økið men tað verður ikki slept. Vit síggja ein stóran áhuga fyri at halda fram við 9 ára loyvunum, ið eru økini norðan og vestan fyri Gullhornið.

Hvør endin verður ella nær og hvar talan verður um eina nýggja byrjan fer bert tíðin at vísa. Oljuleiting krevur umframt orku, tol og tíð. Men hetta er so eisini ein spurningur millum føroysku oljumyndugleikarnar og oljufeløgini. Um hesi kunnu finna fram til eina semju, ið um somu tíð, er góð fyri leitingina og fyri oljufeløgini. Tað verður ein torfør ballansugongd. Sigast má tó um Oljumálaráðið, at tað hevur dugað væl at halda áhuganum gangandi og at seta tey neyðugu krøvini. Nú eru vit so í eini fasu, har tað eisini verður brúk fyri liðiligheit og lurtan eftir hvørjum øðrum. At síggja nýggjar møguleikar. Og kanska er tað júst nú, at tað eisini er brúk fyri eini nýggjari útbjóðing, sum kann fáa eisini onnur oljufeløg at vísa áhuga, tó at tað í skrivandi løtu ikki sær alt ov bjart út.

Oljumálaráðið hevur spælt síni kort væl. Drill or pay er ein rættur politikkur í einum jomfrúuligum øki sum tí føroyska. Tað tvingar oljufeløgini til at hugsa kreativt. Bólturin er harvið hjá oljufeløgunum.

Men hvat BP ætlar, sum var mest agressiva oljufelagið í byrjanini, verður áhugavert at frætta nærri um. Og sjálvandi: hvat ætlar OMR við teimum fýra brunnunum í Gullhorninum, við 9 ára loyvunum og við eini nýggjari útbjóðing!

Hin stóri spurningurin, sum vit helst fara at síggja og hoyra meira til komandi tíð, er hvussu tað hevur eydnast at fáa føroysku vinnuna við í uppgávurnar. Hvussu gekst við ENI boringini í so máta verður uttan iva ein av tjakspurningunum í næstu framtíð. Og hvussu hava myndugleikarnir megnað at fáa oljufeløgini at liva upp til lógina ella andan í lógini um føroyskan kaikant. Og sum rosinan í pylsuendanum: hvussu hevur lógarinnar orð hóskað og livað upp til vónir og avbjóðingar.